LM-022/2020

Annika Petersen

Fra: Pól Edvard Egholm
Sendt: 25. august 2020 13:51
Til: Joanna Djurhuus; Sørin Pram Sørensen
Emne: VS: Viðv. Leingjan av avmarkaðum upplatingartíðum

ttk

Fra: Birita Biskopstø <birita@industry.fo>
Sendt: týsdagur, 25. august 2020 13:09
Til: Helgi Abrahamsen <HelgiA@uvmr.fo>
Cc: Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>; Herálvur Joensen <HeralvurJ@uvmr.fo>
Emne: Viðv. Leingjan av avmarkaðum upplatingartíðum

Til landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum:

Viðv. Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19.

Tá ið hjálparpakki 3 var viðgjørdur í løgtinginum var brádliga eitt uppskot um broyting í matstovulógini á tinglistanum og til viðgerðar í vinnunevndini.

Ferðavinnufelagið kendi ikki til hetta uppskotið, sum kom mest sum inn gjøgnum bakdyrnar. Tað frættist síðani, at talan skuldi vera um eina heimild, ið ætlanin ikki var at brúka, og skuldi hon kortini verið brúkt, so var ætlanin ikki, at hesar møguligu avmarkingarnar skuldu vera galdandi fyri matstovur.

Beint eftir ólavsøku var so kunngerð lýst við støði í hesi heimild í matstovulógini, og nú var greitt, at matstovur vóru eisini fevndar avmarkingini. Ferðavinnufelagið gjørdi ikki stórvegis við hetta, tí smittustøðan var álvarslig og gildistíðin rættiliga avmarkað.

Nú tað letur til, at ætlanin er at leingja hesa avmarkingarlóggávuna, vil Ferðavinnufelagið staðiliga heita á politiska myndugleikan at bíða so leingi sum møguligt við einum slíkum átaki. Verður smittustøðan so álvarslig aftur, at neyðugt er at seta hesar avmarkingar í verk aftur, so verður mælt til at gera tað í so stutt tíðarskeið sum møguligt, tvs. í tær 2-3 vikurnar tað hevur víst seg at fáa tamarhald á smittuni.

Í lágárstíðini, sum stendur fyri framman í ferðavinnuni, liva matstovur og gistingarhús næstan burturav av veitslum og privatum tiltøkum. Um avmarkingarlóggávan verður longd kann væntast, at tílík tiltøk verða hildin undir óskipaðum umstøðum. Gistingarhús og matstovur hava hølir, umstøður og førleika til at klára at halda tilmælini um eitt nú frástøðu, handreinføri og reinføri í heila tikið.

Ferðavinnufelagið vil tí heita á landsstýrismannin um ikki at leingja avmarkingarlóggávuna, um tað ikki verður mett at verða alneyðugt fyri heilsutrygdina í landinum. Skuldi smittustøðan versna nógv aftur, verður mælt til at taka málið upp til nýggja viðgerð, eins og tað verður mælt til, at matstovur og gistingarhús ikki verða fevnd av avmarkingini framyvir.

Vinaliga/Best Regards

Birita Biskopstø, ráðgevi/adviser

Vinnuhúsið / House of Industry

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Phone: +298 309900 · Cell phone: +298 739911
birita@industry.fo - www.industry.fo